


*Bartalsstovuhandilin í Sandavági lat ígjár upp við nýggjum eigarum. Og tað fegnast tað tilkomna fólkið í Sandavági um*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Sami handil við nýggjum eigara

**Tað gekk bara ein einstakur dagur frá tí handilin hjá R. Rasmussen í Sandavági lat aftur, til hann lat uppaftur í gjár við nýggjum eigarum.**
**– Vit hildu tað vera spell, um sandavágsfólk ikki skuldu kunna farið til handils í heimbygdini, sigur Álvur Samuelsen, leiðari hjá Keypssamtøkuni í Vágum**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandavágur:** Tað mundi helst harma mong fólk í Sandavági, tá tíðindi fóru at ganga, um at hesin handilin – ella Bartalsstova sum tey nevna hann – skuldi lata aftur.

Tað gjørdi hann so leygardagin í farnu viku, men samstundis vísti tað seg, at Keypssamtøkan í Vágum hevði leigað hesi handilshølini.

Tá so sandavágsfólk fóru til handils í gjáramorgunin var handilin tann sami. Broytingin var bert hon, at tað nú var Keypssamtøkan sum stóð sum eigari.

Í framtíðini kemur tað tí at verða so, at handilin fer at varðveita navnið Bartalsstovuhandilin, men at búmerkið hjá Keypssamtøkuni fer at standa við síðuna av.

Hóast handilin bert hevur verið opin tveir dagar, so skilst á sandavágsfólki at tey eru fegin um hetta.

– Vit hava so bara fingið positivar afturmeldingar, sigur Álvur Samuelsen.

**Sunt við kapping**

At stórir handlar yvirtaka teir smærru er ikki ókent fyribrygdi innan handilsheimin. Og tí er einki óvanligt í hesum málinum.

– Vit ynskja at varðveita handilslívið í nærumhvørvinum. Og vit ynskja tí eisini, at vera nær við viðskiftafólkini, sigur Álvur.

Bartalsstovuhandilin er einasti matvøruhandilin í Sandavági. Lat hann aftur, so høvdu fólk verið noydd at farið av bygdini fyri at keypa tær vørurnar, sum krevjast til eitt húski.

– Tað er altíð gott við kapping. Tað er sunt, og nú høvið beyðst at yvirtaka Bartalsstovuhandilin, so tóku vit av, sigur hann.

**Fastur kundaskari**

Bartalsstovuhandilin í Sandavági hevur so líðandi arbeitt upp ein fastan skara av kundum, kanska serliga millum tað eldra fólkið.

Nú er so ætlanin at halda fram á somu leið, og framvegis tryggja fólki møguleikan at keypa matvørur í heimbygdini. Leiguavtalan er galdandi í fimm ár.

Eingin ivi er um, at tað hevur stóran týdning fyri fólkið í Sandavági at ein handil framvegis verður í bygdini.

Hjá teim, sum ikki hava bil hevði tað verið ein trupulleiki, at sloppið av bygdini fyri at fara til handils.

Men tað sleppa tey so nú. Og tað er tí helst so, sum sagt verður ú Sandavági: "Ein virðismetir ikki ta ein hevur, fyrrenn tað er burtur".

# Klaksvík á odda fyri tey eldru

**Klaksvík kann gerast ein undangongukommuna, tá talan er um pláss á eldraheimum. Óhugsandi er ikki, at brúkararnir sjálvir fáa møguleika at keypa lut í sínum eldraheimsplássi**

ELDRAØKIÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Á býráðsfundi í farnu viku samtykti býráðið eitt uppskot frá sosialu nevnd um landsstuðul til eldraheim.

Uppskotið var frá einum meiriluta í nevndini, sum skjeyt upp at kommunan eigur at fáa ein fund í lag við landsstýrið um málið.

Á hesum fundinum skal tosast um støðuna á eldraøkinum í Norðoyggjum, og hvussu hetta best kann verða skipað í framtíðini.

Ynskið hjá kommununi er, at tørvurin á hesum øki verður nøktaður so skjótt sum tað er fíggjarliga møguligt.

– Hetta skal eisini gerast á skilabestan hátt fyri skattaborgarans pening, stendur í samtyktini hjá býráðnum.

Ætlanin er síðani, at tað framhaldandi arbeiðið skal verða gjørt í samráði við áhugabólkarnar á eldraøkinum, og í samskifti við hinar kommunurnar í økinum.

**Bíða til 2008**

Nakað av orðaskifti hevur verið til spurningin um eitt nýtt røktarheim skuldi byggjast í Klaksvík, nú ella seinni.

Eitt ávíst fyrireikingararbeiði er longu gjørt í hesum máli. Men undan fundinum í farnu viku var tó greitt, at semja var ikki um at byggja eitt slíkt heim í løtuni.

Borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen hevði framman undan sagt, at hetta átti at bíða, tí tørvur var á øðrum størri útbyggingum í kommununi fyrst.

Men úr andstøðuni var ikki semja um hetta, tí hetta málið átti at raðfestast høgt.

Sosiala nevndin hevur havt hetta málið til umrøðu, og her mælir ein meiriluti frá, at søkja um stuðul til hesa bygging.

Grundgevingin var, at aðrar bráðneyðugar íløgur áttu at verðið gjørdar fyrst, meðan ein minniluti mælti til at senda Almanna- og Heilusmálaráðnum umsókn um stuðul til 32 røktarheimspláss.

Tá málið kom fyri á fundinum varð eitt broytingaruppskot samtykt, har skotið varð upp at gera Klaksvík til eina undangongu-kommunu innan eldraøkið.

Miðað verður eftir at tann fyrsta avsetingin til hetta verður á langtíðarætlanini til eldraøkið í 2008.

## Ferðamannaskip kemur aftur

**Runavík:** Líkt er til, at umboðini fyri týska cruiseskipið "Deutchland" vóru sera væl nøgd við øll viðurskiftini í Runavík, tá vitjað varð her í august mánaði í fjør.

Í øllum førum er greitt, at reiðarí'ið hevur avgjørt at koma aftur við skipinum á Runavík í august mánaði 2007.

Sagt verður, at Runavík og Runavíkar Havn eru sera vælegnað til vitjanir av slíkum ferðamannaskipum, og tí er ikki óhugsandi at enn fleiri ferðamannaskip fara at vitja hagar í framtíðini.

Umboðsfelagið fyri hetta týska ferðamannaskipið er Baldur hjá Johan Mortensen í Havn.

**sb.**



*Runavíkar Havn er vælegnað til stór ferðamannaskip*

## Stórarbeiðir innan skúla og eldrarøkt

**Havn:** Hesi komandi árini fer Tórshavnar kommuna at gera stórar íløgur á mongum økjum.

Millum hesar stóru verkætlanirnar er bygging av einum nýggjum røktarheimi við Hoyvíkstjørn, ein útbygging av Argja skúla og nýtt ellisheim Yviri við Strond.

Á býráðsfundi í farnu viku vórðu vald umboð fyri býráðið í bygginevndirnar fyri tær báðar fyrrnevndu verkætlanirnar, meðan valið av bygginevndini til ellisheimið verður framt seinni.

**sb.**

## Røktarheim til 32 búfólk

**Streymnes:** Arbeiðið við liðugtgerðini av nýggja røktarheiminum á Mørkini í Streymnesi gongur framá.

Leiðari er settur, og í hesum døgum verður lýst eftir starvsfólkum til heimið, sum fer at kunna hýsa 32 búfólkum. Tey byrja í starvinum 1. mars ella fyrri.

Búfólkini sjálvi koma at búgva í fýra eindum við átta búfólkum í hvørjum.

**sb.**

## 25 ár á baki

**Samkoma:** Í morgin – 1. februar – eru liðin 25 ár síðani samkoman í Hoyvík/Oasan fór undir virksemið sítt.

Hóast 25 ár eru long tíð, so er ætlanin ikki at gera so nógv burtur úr hesum. Kortini verður skipað fyri einum hátíðarhaldi við vikuskiftismøtum í Oasuni í Hoyvík næstkomandi vikuskifti.

Við hesi vikuskiftismøtini fara talarar úr samkomuni í Hoyvík, eins og talarar aðrastaðni frá úr landinum, at tala.

**sb.**



*Nógv er hent í samkomuni síðani tey byrjaðu fyri 25 árum síðani. Nú húsast tey í nýggjum og rúmligum hølum í Hoyvík*